# – Tað ræður um at hanga í




*Nikkel legði árla til brots mánamorgunin. Hann fór avstað kl. 5:30 og var aftur kl. 13. – Hetta er eitt gott lív, sigur hann*

**72 ára gamli Nikkel Petersen hevur arbeitt bæði á landi og sjógvi. Í løtuni er hann mitt í hummaraveiðuni. - Tað er nógv betri at royna eftir hummara um summarið. Um veturin kundi tað vera grúsommiliga strævið, sigur hann**

HUMMARAVEIÐA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Runavík:** Klokkan er farin at nærkast eitt, tá ein útróðrarbátur kemur siglandi inn í havnarlagið.

Umborð á bátinum stendur tann 72 ára gamli runavíkingurin, Nikkel Petersen. Hann hevur enn einaferð verið á hummaraveiðu við báti sínum Másin.

Rúsurnar hevur hann drigið á Tangafirði, og í einum kari við sjógvi standa kassarnir við hesi dýrabaru og livandi veiðuni.

Hann leggur at landi, bindur bátin fastan og tekst við ymiskt umborð, meðan hann bíðar eftir bilinum.

Nikkel veit, at ein bilur er á veg higar eftir veiðuni henda dagin. Allur hummarin verður seldur til fyritøkuna ORCA, sum hevur tilhaldsstað á Argjum, men sum arbeiðir hummarin í Kollafirði.

– Tað hevur gingið soleiðis nøkulunda hesi árini, eg havi roynd eftir hummara. Okkurt árið hevur verið gott og okkurt annað minni gott.

– Men sum heild hevur tað hilnast væl, sigur Nikkel Petersen.

### Mugu dríva tað

Nógvir bátar fáa loyvi til hummaraveiðu á hvørjum ári. Og teirra millum er útróðrarbáturin Másin.

Saman við Nikkeli eru tveir aðrir bátar úr Runavík, sum royna eftir hummara í ár.

– Vit eru tó bert tveir sum dríva tað ordiliga – eg og ein annar sum royna tríggjar ferðir um vikuna.

– Tað er man noyddur at gera, um man skal fáa nakað burtur úr tí. Tað er ikki annað at gera enn at hanga í, sigur Nikkel.

Másin er væl útgjørdur bæði til fiskiskap við línu og snellu, men eisini til veiðu eftir hummara.

– Tað er faktisk hummaraveiðan sum í dag eigur lívið í einum, slær Nikkel fast.

– Hetta er ikki so galið. Hetta er akkurát fyri pensjónistar, tí ein krevur ikki so nógv.

Skipanin við hummaraveiðuni er tann, at Nikkel hevur eina kvotu uppá 2500 kilo. Men er heildarkvotan uppi áðrenn hann hevur fingið hesa nøgdina, fær hann ikki øll hesi kilo'ini sjálvur.

– Tí ræður tað bara um at hanga í, sigur hann.

### Grúsommiliga strævið

Tíðin, har loyvt er at royna eftir hummara, er broytt. Í dag byrjar vertíðin fyrst í apríl mánaði.

Fyrr var bert loyvi at royna um veturin, men tá kundi viðra rættiliga illa hjá bátunum

– Eg byrjaði í 1977 og tá royndu vit alt árið. Men tá var grúsommiliga lítið at fáa.

– Síðani varð tað broytt til at vera um vetrarhálvuna. Tá byrjaðu vit hálvan september og út í hálvan apríl. men eg vil tó siga, at tað var eitt hundalív at royna um veturin, slær Nikkel fast.

Teir royndu nógv í Tangafirði, men var hann útnyrðingur ella útsynningurvestan í ættini var ofta nógvur vindur og nógvar glaður.



*Hjá Nikkel Petersen og øðrum hummarafiskarum er Tangafjørðurin álitið. Støddin á hummaranum er eisini í lagi*

– Tað var grúsommiliga strævið. Men soleiðis sum skipanin er nú, dámar mær nógv betri.

– Tað einasta sum man nú kann verða hindraður av er toka. Dreggini standa so mikið nær hvørjum øðrum, at man sær so illa.

– At seta eftir radaranum, – tja, eg veit ikki. Og plottarin hjá mær er so lítil, at eg má hava brillur fyri at hyggja í hann. So tú skilir, at tað er ikki av tí besta, sigur Nikkel.

### Dálking

Tá talan er um hummaraveiðu hjá bátunum á Skálafjørðinum og í nánd av honum, hevur Tangafjørðurin verið álitið – og er tað enn.

Nikkel hevur onkutíð roynt eftir hummara á Skálafjørðinum, men tað er ikki so væl roynandi, tí fjørðurin er vorðin so dálkaður.

– Eg haldi ikki at hummarin trívist rættiliga her, sigur hann.

Onkutíð hevur hann tó fingið kvotu sína á Skálafjørðinum. Her hava verið nakrir aðrir og roynt, men sum skilst hevur veiðan ikki verið hin mesta.